## Frá Tórshavnar kommunu

Nú seyðurin er farin av bønum skulu allir garðar og hegn vera í seyðahøgum standi í Tórshavn, á Argjum, í Hoyvík, á Hvítanesi, í Kaldbak, í Kollafirði, í Kirkjubø, á Velbastað, í Hesti og í Nólsoy.

Um hesi viðurskifti ikki eru í lagi skulu tey fáast í rættlag beinanvegin. Hegn- og garðasýni fer fram í allari kommununi frá í komandi viku.

**Tórshavnar kommuna**

## Føroya Heimavirkisfelag

Aðalfundur felagsins verður hósdagin 27. mai 2010 kl. 20.00 í hølum felagsins í J. Paturssonargøtu 24, Tórshavn.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

Føroya heimavirkis felag

Nú kanst tú søkja um

## Stuðul til gransking

**Stuðul verður latin:**
- føroyskum granskarum og granskaralesandi
- gransking og menning á ella í tilknýti til føroyskar granskingar stovnar og vinnufyritøkur
- gransking og menning, ið hava týdning í føroyskum høpi

**Stuðul verður latin til ymisk sløg av verkætlanum:**
- Ph.D.-verkætlanir
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan
- granskingarverkætlanir, sum fevna um vinnumenning og vinnugransking

**Tað er ein fyrimunur at:**
- verkætlanin fevnir um samstarv millum fleiri granskarar
- verkætlanin fevnir um samstarv millum granskarar, granskingarumhvørvi og vinnuna

**Tað verður kravt at:**
í minsta lagi 1/3 verður fíggjaður av øðrum enn Granskingargrunninum. Undantak kann tó gerast fyri Ph.D. verkætlanir.

Minstamark fyri stuðli til verkætlanir er 80.000 kr.

Umsóknir skula skrivast á skandinaviskum ella enskum máli á serligt oyðublað, ið fæst á skrivstovu ráðsins og kann heintast á heimasíðuni. Skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

Gevið gætur, at umsóknir skulu sendast við telduposti. Sí nágreinilig krøv á gransking.fo.

**Umsóknarfreist er:**
1. september 2010, kl. 12.00 føroyska tíð. (Í 2011 verður árliga umsóknarfreistin flutt fram til 15. februar)

Umleið 7 mió kr. eru tøkar til nýggjar verkætlanir.

sansir.fo

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki:**
- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking og menning

granskingarráðið THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 56 78 00 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo

## KUNNGERÐ

**Avtøka av billetskipanini á Kommunalu Brennistøðini**

Við hesum verður boðað frá, gjaldsskipanin við billettum á Kommunalu Brennistøðini verður avtikin. Billettir kunnu nýtast at gjalda við til og við 30. juni 2010. Sumuleiðis verða keyptar billettir refunderaðar til og við 30. juni 2010.

www.torshavn.fo TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Næmingur

- søkt verður eftir næmingi til bókhaldið

Kundi tú hugsað tær lærupláss í einari fyritøku, har nógv er at gera, og har tú ert partur av einum starvsfólkatoymi, ið støðugt strembar eftir at mennast og gerast betri?

Vit leita eftir ágrýtnum og dugnaligum næmingi til bókhaldið at byrja 1. august 2010 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**
Tú hevur lokið studentsprógv, HF, HH ella líknandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og mennandi lærupláss í einum umhvørvi, har tað snýr seg um at veita eina góða tænastu.

Eru spurningar, ber til at ringja til Óla Reinert, telefon 360128.

Send tína umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 7. juni 2010 til:

P/F Poul Hansen
Postsmoga 3016
FO-110 Tórshavn
Merk brævbjálvan:
"Næmingur"

P/f Poul Hansen er størsta heilsøla í Føroyum. Umleið 75 fólk starvast í samtakinum, sum varð stovnað í 1927. P/f Poul Hansen umboðar sterk og dygdargóð vørumerki, og umleið 6500 ymisk sløg eru í vøruskránni.

sansir.fo

P/f Poul Hansen Heilsøla

**SPECIAL (20 kg)**
Turrfóður til vaksnar hundar. Er eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.
**Fyri posan...... kr. 450,-**

**SØCLA (20 kg)**
Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.
**Fyri posan...... kr. 540,-**

**SKYTTENs KAT (15 kg)**
Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur.
**Fyri posan...... kr. 390,-**

Kvalitetsfóður til kettur og hundar



**Bílegg beinleiðis á netinum**

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com · Telefon 21 19 96 ÓKEYPIS ÚTKOYRING Í TÓRSHAVN OG NÆRINDIS